VINNUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Tórshavn, tann 2. februar 2011
Vmr. J.Nr.: 11 /00087

Viðgjørt: SPS

**Løgtingsmál nr. /2010: Uppskot til løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki**

# Uppskot

# til

# løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki

*Kapittul 1*

*Lógarøki*

**§ 1.** Eftir hesi lóg er mismunur allur beinleiðis ella óbeinleiðis mismunur orsakað av breki.
*Stk. 2.* Beinleiðis mismunur verður framdur, tá persónur orsakað av breki verður viðgjørdur verri enn ein annar verður, hevur verið ella hevði verið viðgjørdur í samsvarandi støðu.
*Stk. 3.* Óbeinleiðis mismunur verður framdur, tá ein áseting, metingarstøði/eyðkenni, ella siðvenja, sum at vísa seg er neutral, hevur við sær, at persónur, ið ber brek, fær eina verri støðu enn aðrir, uttan so, at viðkomandi áseting, treyt ella siðvenja er objektivt grundað á eitt sakligt endamál, og tiltøkini at røkka tí eru hóskandi og neyðug, sbr. tó § 3.
*Stk. 4.* Lógin verður ikki nýtt í tann mun, samsvarandi verja móti mismuni er ásett í sáttmála á arbeiðsmarknaðinum.

*Kapittul 2*

*Bann móti mismuni*

**§ 2.** Tað er ikki loyvt arbeiðsgevara at gera mismun á starvsfólki ella umsøkjarum til størv, sum eru leys, í sambandi við starvssetan, uppsøgn, starvsflyting, starvsuppflyting, ella viðvíkjandi lønar- og setanartreytum.
*Stk. 2.* Tað er mismunur viðvíkjandi lønartreytum, um tað ikki verður veitt sama løn fyri sama arbeiði, ella fyri arbeiði sum hevur sama virði.
*Stk. 3.* Arbeiðstakari, ið ikki fær løn sambært 1. stk., skal hava útgoldið munin.

**§ 3.** Tað er ikki loyvt at lýsa við, at tað til setan í starv ella vinnuliga útbúgving verður søkt eftir persónum, ið bera brek, ella at persónar, ið bera brek, hava fyrimun. Tað er heldur ikki loyvt at lýsa við, at persónar, ið bera brek, ikki verða ynsktir.

**§ 4.** Ásetingar í einsæris avtalum ella sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum og í innanhýsis reglum hjá fyritøkum o.a., sum eru í stríð við bannið móti mismuni í § 2, hava ikki gildi.

**§ 5.** Tað kann ikki verða vikið frá lógarinnar ásetingum til bága fyri arbeiðstakaran.

TINGANES • POSTSMOGA 377 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 30 66 60 • TELEFAX 30 66 65 • E-MAIL: VMR@VMR.FO

*Kapittul 3*

*Samsýning, próvdøming o.a*

**§ 6.** Persónar, hvørs rættindi eru sett til viks, við at brot brot er framt á § 2, kunnu fáa samsýning.
Stk. 2. Persónur, sum verður fyri ófyrimunaligari viðgerð ella ófyrimunaligum fylgjum, tí viðkomandi hevur sett fram krav um líka viðgerð eftir § 2, kann fáa samsýning.

**§ 7.** Brot á § 3 verður revsað við bót.
Stk. 2. Er brotið framt av einum felag, einum sjálveigandi stovni, grunni ella líknandi, kann bót verða áløgd tí juridiska persóninum sum slíkum revsiábyrgd. Er brotið fram av landinum, einari kommunu ella kommunalum felagsskapi, sum er fevndur av § 51 í kommunustýrislógini, kann revsiábyrgd verða áløgd landinum, kommununi ella kommunala felagsskapinum.

**§ 8**. Klagur um brot á bannið móti mismuni eftir hesi lóg, og um brot á bannið móti revsiatgerðum í § 6, stk. 2, verða viðgjørdar av Javnstøðunevndini eftir løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn.

*Kapittul 4*

*Ígildiskoma*

**§ 9.** Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Viðmerkingar til lógaruppskotið

Kap. 1. Almennar viðmerkingar

**1. Endamálið við lógini**
Løgtingið hevur samtykt at seta í gildi fyri Føroyar Sáttmála Sameindu Tjóða frá 13. desember 2006 um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sbr. løgtingsmál nr. 162/2008.

Tá nevnda mál var til viðgerðar, boðaði landsstýrið frá, at millum aðrar lógir, sum skuldu setast í gildi fyri, at sáttmálin kann verða útintur, fór landsstýrið at leggja fyri Løgtingið nýggja lóg, sum ásetur, at tað er bannað at gera mismun vegna brek í sambandi við starv og starvssetan.

Endamálið við ST-sáttmálanum er at tryggja teimum, ið bera brek, fulla og javna atgongd til verju og nýtslu av øllum mannarættindum, at tryggja tey grundleggjandi frælsisrættindini og at fremja virðing fyri íbornu tign hjá fólkum, ið bera brek. Fólk, ið bera brek, skulu hava júst somu rættindi sum onnur, og verjan skal vera verulig og virkin.

Í § 27 í sáttmálanum er m.a. ásett: “*Limalondini viðurkenna rættin hjá fólki, ið bera brek, til at arbeiða á jøvnum føti við onnur; hetta inniber eisini rættin til at vinna til lívsins uppihald við einum arbeiði, valt av fríum vilja ella góðtikið á arbeiðsmarknað og arbeiðsumhvørvi, sum er opið, sum roknar uppí og gevur atkomu til fólk, ið bera brek*”.

Limalondini skulu verja og virka fyri, at rætturin til arbeiði verður framdur, eisini hjá teimum sum gerast brekað í sínum arbeiði, við at taka hóskandi stig, eisini gjøgnum lóggávu. Londini skulu m.a. verja rættin hjá fólki, ið bera brek, til - á jøvnum føti við onnur – rættvís og gagnlig arbeiðsviðurskifti, harímillum javnbjóðis møguleikar og somu løn fyri arbeiði við sama virði, trygg og heilsugóð arbeiðsviðurskifti, harímillum verju ímóti happing og uppreisn fyri vanbýti.

**2. Høvuðsinnihaldið í lógaruppskotinum**
Uppskotið hevur til endamál á ein dyggan hátt at útinna nevnda sáttmála á føroyska arbeiðsmarknaðinum, og er uppskotið av hesi orsøk avmarkað til at fevna um eyðkennið brek.

Uppskotið inniheldur alment bann móti mismuni av nevndu grund. Bannið er galdandi í sambandi við starvssetanina, undir starvssetanini, og í sambandi við at starvssetanin endar, og fevnir bæði um beinleiðis og óbeinleiðis mismun.

Í lógaruppskotinum er allýsing av hugtakinum mismunur, t.v.s. beinleiðis og óbeinleiðis mismunur.

Lutfalsmeginreglan verður lógfest í ásetingini um møguleika at gera undantøk.

Í uppskotinum er áseting um vernd móti ófyrimunaligari viðgerð ella ófyrimunaligum fylgjum sum avleiðing av klagu, við tí endamálið at tryggja at meginreglan um líka viðgerð verður fylgd.

Eftir uppskotinum fær Javnstøðunevndin víðkaðar heimidir við tað, at málsræðið hjá nevndini eisini fer at fevna um klagur eftir hesi lóg. Javnstøðunevndin kann geva vegleiðandi úttalilsi um, hvørt lógin er brotin, men kann ikki áleggja bót, men hoyrir hesin spurningurin undir dómstólarnar.

**3. Ummæli**

**Kap. 2. Avleiðingar av uppskotinum**

**1. Fíggjarligar avleiðingar**

**A. Fyri landið**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri landið.

**B. Fyri kommunurnar**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri kommunurnar.

**C. Fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar við sær fyri vinnuna.

**2. Umsitingarligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar.

**3. Umhvørvisavleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisavleiðingar.

**4. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**5. Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

**6. Sosialar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar sosialar avleiðingar.

**Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar**

| | Fyri landið/ landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kap. 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1:**
Ásetingin setur mørkini fyri nýtsluøki lógarinnar og allýsir hugtakið mismunur, sum tað skal skiljast í hesi lóg.

Brek er ikki allýst í lógini. Sum praksis hevur skilt hugtakið brek, kann hetta orðast soleiðis: Til tess at talan kann vera um brek ella um ein persón við breki, má tað kunna staðfestast ein kropslig, andlig førleikaminking, sum hevur við sær ein kompensatiónstørv til tess at viðkomandi kann virka á jøvnum føti við aðrar borgarar í samavarandi lívsstøðu, sbr. Handicap og Ligebehandling – et reflektionspapir s. 2 Det Centrale Handicapråd 2001.

Lógin ásetur bann móti bæði beinleiðis og óbeinleiðis mismuni. Bannið móti beinleiðis mismuni er ásett til tess at sleppa undan, at tað verða sett formelt neutral eyðkenni, sum tó hava við sæt mismunaliga viðgerð av fólki, ið bera brek.

Talan er um beinleiðis mismunaliga viðgerð t.d. í teimum førum, har arbeiðsgevarin letur vera við at seta ein arbeiðstakara ella sigur honum upp við tí staðiligu grundgeving, at viðkomandi hevur brek.

Tað er talan um óbeinleiðis mismun, tá ein formelt lutleys áseting ella treyt í praksis fær ólutfalsliga stóra ávirkan á fólk, ið bera brek, uttan so at hetta er objektivt grundað við atliti til arbeiði.

Bannið móti óbeinleiðis mismuni hevur ikki við sær beinleiðis bann móti formelt lutleysum krøvum, sum hava við sær at persónar, ið bera brek, fáa eina verri støðu enn aðrir borgarar, um kravið er objektivt grundað á eitt sakligt endamál, og tiltøkini at røkka endamálinum eru hóskandi og neyðug (proportionalitetsmeting). Tað valdast eina konkreta

meting, um viðkomandi endamál er sakligt, og um tiltøkini at røkka tí eru hóskandi og neyðug.

Ásetingin í § 1, stk. 6 hevur við sær, at lógin víkir, um tað eru sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum, sum regulera spurningin. Hetta merkir, at mál um brot á bannið móti mismunaligari viðgerð í tílíkum førum skulu verða viðgjørd við fakrættarligu stovnarnar, meðan tað í øðrum førum eru dómstólarnir, sum viðgera tílík mál.

**Til § 2.**
§ 2, stk. 1 er høvuðsásetingin í lógini.

Sum hon er orðað, hevur ásetingin víðan týdning við tað, at hon fevnir um allar setanartreytir, bæði tær sum eru ásettar eftir avtalu, og tær sum arbeiðsgevarin sjálvur hevur ásett. Tað er uttan týdning fyri metingina av hvørt mismunur verður framdur, um hetta verður gjørt eftir generellum reglum, ella um arbeiðsgevarin tekur ítøkiliga avgerð eftir tí í § 1 nevnda eyðkenni. Hevur arbeiðsgevarin í longri tíð reglufast latið vera við at seta fólk, ið bera brek, hóast tað hava verið umsøkjarar frá nevnda bólki við neyðugum førleikum, er hetta ábending um, at arbeiðsgevarin fremur mismun í stríð við hesa lóg.

**Til § 3.**
Ásetingin hevur við sær, at lýsingar eftir arbeiðsfólki skulu verða neutralar í mun til eðkennið brek í § 1, og er ein neyðug fortreyt fyri, at § 2 skal virka í praksis. Tann ásetingin missir sín týdning, um tað er loyvt at lýsa við, at bert fólk, ið bera ávíst brek, ella ikki bera ávísit brek, hava áhuga.

**Til § 4.**
Allar ásetingar, sum eru í stríð við meginregluna um eins viðgerð, og sum standa í einsæris avtalum ella sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum og í innanhýsis reglum hjá fyritøkum o.a., hava ikki gildi ella kunnu verða sagdar ógildar.

**Til § 5**
Tað kann ikki verða vikið frá lógarinnar ásetingum til bága fyri arbeiðstakaran.

**Til § 6.**
Ásetingin inniheldur tiltøk fyri brot á § 2. Hvørt samsýning skal verða latin verður avgjørt við vanligu dómstólarnar, og tað valdast í fyrsta lagi, hvussu groft brotið er. Samsýningin er fyri fíggjarligan skaða, viðkomandi hevur havt. Hetta forðar ikki fyri, at tað umframt samsýning skal latast endurgjald eftir vanligu endurgjaldsreglunum.

**Til § 7.**
Tá brot verður framt á § 3, verða rættindini hjá einum breiðum skara av starvsfólkum, sum bera brek, skerd, nevniliga øllum teimum, sum í einari ólógligari lýsing verða útihyst frá at søkja. Tað er ikki møguligt at lata einum breiðum ikki nærri lýstum skara av starvsfólkum samsýning, og tí er álagt bót fyri brot á § 3.

**Til § 8**.
Eftir uppskotinum verður málsræðið hjá Javnstøðunevndini víðkað til eisini at fevna um klagur eftir hesi lóg. Javnstøðunevndin kann geva vegleiðandi úttalilsi um, hvørt lógin er brotin, men kann ikki áleggja bót, og hoyrir hesum spurningurin undir dómstólarnar.

**Til § 9.**

Lógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Johan Dahl**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen